Lesarabrøv

Nú er ovboðið

Nær hevur Føroya fólk fingið nóg mikið av hesi herferð, ið verður framd ímóti verkafólki, fiskimonnum, teimum óarbeiðsføru og arbeiðsleysu av ráðaleysa, dugnaleysa stýri landsins.

Teir eru lagstir á pensiónistar, allar frádráttir fyri onnur enn seg sjálvar hava teir avtikið. Nú skal arbeiðsloysisstuðulin niður í 35%, hvør kann liva av tí? Tá Jóannes Eidesgaard sigur, at hetta var tað frægasta, politisk semja kundi fáast um, so er tað uttanumtos, hann er fullvæl greiður yvir, at aðrir flokkar eru á tingi, lat teir sleppa og vísa, hvat teir vilja. Tað stendur eisini Jóannesi Eidesgaard frítt at siga samgonguna upp, men sessurin er ivaleyst ov góður at fara frá. Nei, javnaðarleiðslan skuldi heldur havt lurtað eftir góðum: ráðum og slitið samgonguna fyri tveimum árum síðani, so hevði kanska sæð frægari út, verri kundi tað so ikki verið, tí slíkt dugna- og ábyrgdarloysi, sum henda samgongan hevur víst er ótrúligt, har valda bert egináhugamál, at lumpa og bóndafanga hin partin og so rósa sær av tí, vísir hvussu lítið skil er í hesum monnum. At teir skiftivís hótta við at slíta samgonguna er bert sjónleikur, teirra moralur er bert mammon. At fólkafloksmenninir báðir nú royndu at fáa tað at siggja út sum teir vildu bjarga arbeiðsloysistryggingini var politiskt platt, vit kenna muruna í fólkafloksmonnunum.

Tá nú Finnbogi Ísakson kemur og tosar um at loysa, so skal eg bara siga honum, sum limur í tjóðveldisflokkinum, at tað er tað síðsta, eg vildi mælt til, sum støðan er, og at ganga sjálvstýrisleið fyrrenn vit hava ruddað upp í tí politiska og moralska rotinskapi, ið gjøgnumsúrgað hevur landsins leiðslu í áravís, er ábyrgdarleys tala.

Hví hevur Finnbogi Ísakson sum politikari og blaðstjóri ikki roynt at ruddað upp og fingið teir seku at standa til svars fyri tað, teir hava fært hetta land út í, ella er tað so, at ongin av tykkum kostnu monnum hevur reinar hendur?

Diktatoriska lyndi landsstýrismanna kemur nú eisini fram, fakfelagsfólk sleppa ikki fram at í teimum almennu fjølmiðlunum, hvat verður tað næsta frá teimum? Um hetta ikki verður steðgað, áttu fakfelagsleiðslurnar at heitt á sínar limir um at nokta at gjalda sjónvarps- og útvarpsgjald, fyrrenn fakfelagsleiðarar og andstøða hava somu møguleikar at siga sína hugsan, sum samgongan.

Sjálvt um landsins leiðsla áhaldandi í bløðum verður skuldsett fyri korruptión/rotinskap og sammett við mafiuna, so letst hon ikki um vón, hon hopar, at hon kann tiga tær í hel, so tað verður gloymt, tað kann vera, at tit sleppa undan einum juridiskum dómi, men fólksins og søgunnar dóm kunnu tit ikki sleppa frá, tað ið tit hava fært hetta land útí, er at meta sum ringasta landasvik, um ikki annað orð finst fyri tað.

Hvat ætla tit fakfelagsleiðarar at gera, nú arbeiðsloysið er um tey 25%, og eftir tykkara egnu útsøgn kann koma upp á 50% í heyst, arbeiðsloysistryggingin setast til 35%. Hvussu halda tit, tit eru í tykkara sessum, tá 50% av tykkara limum bert hava 25% av eini arbeiðsmannaløn og minni at liva av? Tá verður ringt at forsvara tykkum, um ikki nakað munagott verður gjørt frá tykkara síðu.

Takið tykkum saman, krevjið at landsstýris/løgtingsmenn royna at liva av hesum. Tá høvdu teir skjótt stungið í sekkin og rýmt, tí tað er teirra ætlan at seigpína tað vanliga fólkið til at rýma av landinum, tí teir unna teimum ikki so frægt at liva av, at tey kunnu lívbjarga sær her.

Er nýval so tað rætta at krevja nú? Nei, so sleppa teir ov lætt. Hevði tað ikki verið vert at umhugsað, at fakfelagsleiðarar tóku seg saman og kravdu eina dómarakanning av øllum tí, ið landsins leiðsla er skuldsett fyri, ímeðan skuldi landsstýrið, tingið, verið sent til hús og eitt 3-manna forrætningsministerium sett til at rudda upp, helst verða tað eisini danir, tí tað vísir seg ikki, at vit hava nakrar at seta til slíkt, um politiskt reinfør skal fáast innaftur um tingsins gátt.

Um fakfelagsleiðslurnar ikki klára at byrgja upp fyri tí ágangi, ið teirra limir nú eru fyri, áttu teir at tikið somu avleiðingarnar, sum landsstýrið/løgtingið átti at havt gjørt, lagt frá sær.

Grát, mítt elskaða land.

Marner Johannesen,
form. Skopunar Arbeiðsmf.
Skopun

Hvørjir gjørdu kanningarnar?

Eftir at hava sæð Kjartan Kristiansen á skerminum greiða frá sínum hugsanum um m.a. lønarviðurskifti og skatt, og síðani lisið greinar hansara í bløðunum, kundi eg hugsað mær at fingið at vita, hvørjir gjørdu hesar kanningar. Hann sigur, at tað er ein bólkur av privatum, ið hava sett hetta upp og gjørt hesar kanningar.

Eitt haldi eg Kjartan skyldar Føroya fólki, og tað er at upplýsa hvørjir, ið hava sitið í hesi nevndini, tað vóni eg at hann sigur okkum í bløðunum.

Sjálvur kann eg lesa tað ímillum reglurnar.

Vinarligast

Danjal Hansen

Til løgmann

Eg havi mist hús og heim og veit ikki míni livandi ráð. Hvat skal eg gera. Húsini eru 3 ár og mist 1,6 mill. kr. Húsalánsgrunnurin hevur keypt húsini fyri 6000 kr. Politiið vil hava okkum út. Hava teir loyvi til hetta. Um Húsalánsgrunnurin hevur loyvi til hetta, so gevi eg lítið fyri okkara lítla land.

Eg vil fegin hava svar frá tær í blaðnum.

Ein føroyingur

Ókeypis í »NØVN NÚ«

Leggið til merkis: Bert tilfar, sum er skrivað á hendan lepan, fær innivist í hesum teigi.
Tilfar í blaðið mikudag skal vera okkum í hendi í seinasta lagi týsmorgun kl. 8.00. Tilfar í leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdag kl. 12.00.
Minnist til at skriva navn og bústað aftan fyri á myndina, og ein frankeraðan brævbjálva, um tygum ynskja myndina senda aftur.

Tekstur: _____

Ynskist undir yvirskriftini:

❒ Heilsanir ❒ Konfirmatiónir ❒ Tøkkir
❒ Brúdleyp ❒ Føðingardagar ❒ Prógv
❒ Starvsdagar ❒ _____

YNSKIST Í BLAÐIÐ:
❒ MIKUDAG ❒ LEYGARDAG

Leggið til merkis: Vit taka okkum rætt til at seta t.d. eina heilsan, sum ynskist í blaðið mikudag, í blaðið leygardag.

Sent hevur:

Navn: _____

Bústaður: _____

Bygd/býur: _____ Tlf.: _____

Sendið lepan til: **Tíðindablaðið Sosialurin**
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »NØVN NÚ«

Ovboðið!!!

Ballstungið fólk,
Vælsignaði mær orðið,
í fjølmiðlum aldri eg tori,
at røða um
tjóðina sum
brátt fellur um.

Reyvrenda fólk,
hvat er til ráð nú at taka?
ikki eitt oyra til nakað,
reyvrenda fólk

Dýrgoldna skatt,
milljardir í stríðasta streymi,
liggja nú pent fyri teymi
við Gomlu Rætt

Holuta land,
øll tíni fjøll gjøgnumborað,
vita skal Gud um teir tora
at bora meir
holini fleir

Lógleysa land!
Pakkar viðskipum teir sendu
til allar menn sum teir kendu
fyri ein slikk
vinarpolitikk

Sikta fólk rætt?
Tagnað er Heygadrangstosið,
prógv hylur SMS-posi
við Føroya rætt.

Ríkt var títt hav,
Virðismikil var fongur
nú kemur annarhvør drongur
ongul í reyv

Fáfongda fólk,
fordi seg sjálvt fram í Focus
gjørdist við eitt hokus-pokus
úthongda fólk

Álmussu, tú,
lova burtur Schlüter og Nyrup
tjóðmerkið dyppað í Dyrup,
lágt blaktrar nú.

Tannleysa fólk,
lítið er bitið í monnum,
nú flýgur kráka við tonnum,
spyr bara hann,
heimasandsmann

Tingleysa fólk,
nú fækkast kallmenn á tingi
lúta við nevni og lingi
Púrgelda fólk

Koyrið teir út!
Leggja vit nú øll í vaðið
aftur bragda skal slagið,
gevið teim krút.

-balleba